# Gospelkonsert í Runavík



Heine Lützen rúnarbant áhoyrarnar við sínari frálíku rødd

Mynd: Heini S. Kristiansen

**Leygarkvøldið var gospelkonsert í ítróttarhøllini í Runavík. Fólk í øllum aldri vóru møtt upp til konsertina**

GOSPELKONSERT
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Fyrst á pallinum vóru Árni og Marner. Teir báðir hava rættiliga gjørt um seg, síðani teir fyri stuttum góvu fløgu út. Serliga teimum eldru dámdu sera væl at hoyra teir báðar.

Eftir teir kom Ungdómskórið á Glyvrum upp. Tey hoyra til í Missiónshúsinum á Glyvrum. Tey hava ikki sungið til eitt so stórt tiltak fyrr, men tað eydnaðist sera væl hjá teimum. Kórið varð stjórnað av Morid Simonsen og Etly Olsen.

Næstir á pallinum vóru Direct Level. Teir eru eftirhondini vorðnir eitt kent navn innan føroyska tónleikaheimin. Teirra stílur var meira til tey ungu. Teir hava fingið ein nýggjan trummuspælara, sum eitur Martin Rúni Joensen. Hann slapp veruliga at royna seg við teimum hørðu rokksangunum hjá bólkinum, og samspælið við hinar í bólkinum riggaði heilt væl.

Til seinast sang Heine Lützen. Heine er ein av teimum kendastu tónleikarunum í landinum. Hann hevur sungið leingi nú, og tað sæst eisini á honum, at hann dugir væl at upptraðka. At hjálpa sær hevur hann sera góðar tónleikarar, og hansara tónleikastílur rakar eina sera breiða áhoyrarafjøld.

Fyrireikarnir siga seg vera væl nøgdar við tiltakið, hóast tað ikki vóru so nógv fólk sum væntað. Allir bólkarnir høvdu góðar framførslur, og teir vístu allir á, at teir sungu, fyri at gera boðskapin um Jesus kendan.

# Størri pall til konsertina við Rebeccu

**Nú fáir dagar eru eftir til heimskenda songkvinnan, Rebecca St. James skal hava konsert í Kelduni í Skálafirði, hevur Keldan avgjørt at byggja verandi pall út**

KONSERT
*Snorri Brend*

**Keldan, Skálabotnur:** Hóast verandi pallur í samkomuhúsinum skuldi verið ríkiliga stórur, er hann heilt einfalt ov lítil tá Rebecca St. James skal hava konsert.

Ein av monnunum í Kelduni, Leif Høj sigur, at teir hava avgjørt at gera eina stálkonstruksjón. Hetta fer at gera allan pallin millum ein og tveir metrar djúpari.

– Stálkonstruksjónin verður gjørd soleiðis, at hon kann brúkast aftur tá aðrar stórar konsertir og tiltøk verða í Kelduni, sigur Leif Høj.

Nevnast kann, at henda konsertin hjá Rebeccu er partur av eini stórari Europaturne. Ferðin byrjaði í Wales fríggjakvøldið, og vitjar hon síðani í Onglandi, Eysturríki, Sveits, Týsklandi, Estlandi og Bulgaria.

Áðrenn Rebecca kemur til Føroyar skal hon eisini hava konsert í Ungarn. Úr Føroyum gongur leiðin til Noregs og Ruslands.



*Rebecca St. James sleppur rættiliga at folda seg út í næstu viku. Neyðugt hevur verið við størri palli í Kelduni*

## Virkin tónleikaprestur vitjar

**Filadelfia:** Seinni í hesi vikuni fær samkoman í Havn vitjan av einum tónleikapresti. Danska Katrine Høgenhaug fer á vitjan síni at luttaka á lovsongsmøti í samkomuni leygarkvøldið.

Katrine er 30 ára gomul og útbúgvin innan tónleikavísind á Lærda Háskúlanum í Keypmannahavn í 2002.

Dagliga arbeiðir hon sum tónleikaprestur í eini kirkju, sum nevnist Kirkjan í Kulturcenteret.

Sum ein part av fyrireiking síni til hetta starvið hevur hon verið eitt ár á Hillsong College í Sydney. Her fekk hon miklan íblástur til arbeiðið sítt út frá hesi samkomuni, sum er kend um allan heim fyri lovsang sín.

Katrine hevur sjálv skrivað ein hóp av tónleiki og er nógv av hesum útgivið á fløgum. Fleiri av sangum hennara eru eisini týddir til føroyskt og eru at finna á fløguni "Vit kunngera Jesus", sum kom út fyri nøkrum árum síðani.

Sum ein part av arbeiði sínum hevur hon hildið fleiri seminar um sangskriving og lovsong í ymiskum samkomum og á háskúlum.

Nú kemur hon so til Føroyar á fyrsta sinni, og verður hon við á lovsongskvøldinum 27. mai í Filadelfia í Havn og á morgunmøtinum dagin eftir.

**sb.**

## Felagsmøtir við talum og sangi



**Nesvík:** Aftur í ár verður leguhúsið í Nesvík karmur um árligu felagsmissiónsvikuna.

Henda møtivikan byrjar mikukvøldið við møti kl. 19:30, har Regin Høgnesen, trúboðari talar og har Marita, Hallgerð og Jóhanna úr Haldórsvík fara at syngja.

Síðani halda møtini fram alt at sunnudegi, tá felags sunnudagsskúli verður kl. 15 og seinasta møtið kl. 18.

Talar og sangkreftir koma ymsastaðni frá úr landinum.

**sb.**

## Møtir við donskum aðalskrivara

**Klaksvík:** Samstundis sum Norðoyastevna er í Klaksvík, verður skipað fyri serstøkum møtum í nýggja samkomubygninginum "Emmaus" í Klaksvík.

Møtini byrja hósdagin í komandi viku, og sum eisini er Kristi Himmalsferðardagur, og halda síðani fram alt vikuskiftið. Talari á møtunum er danin Ole Andersen, sum eisini er aðalskrivari í felagsskapinum "Ordet og Israel".

Tiltøkini eru almenn, men eitt av møtunum vendir sær serliga til tey, sum virka sum talarar í samkomuhúsum. Hetta møtið verður leygarmorgunin 27. mai.

Byrjað verður tá við kaffi og rundstykkjum, og kl. 10 fer Ole Andersen at tosa um evnið, hvussu ein kann boða út frá Gamla Testamenti nú á døgum. Eftir hetta greiðir hann frá teim nýggjastu tíðindunum úr Ísrael.

Møtirøðin við Ole Andersen endar við bibliuundirvísing sunnudagin 28. mai.

**sb.**